Fylgiskjal 3

LM-033/2023

FAMILJUFYRISITINGIN

Dr. Jakobsens gøta 21 | FO-100 Tórshavn | Tel. 20 22 24 | famf@famf.fo | famf.fo

Tórshavn, tann 18. august 2023
Málsnr. 22/21730-32

Løgmálaráðið

att: Elsa Magnussen

Viðmerkingar frá Familjufyrisitingini til uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru (foreldramyndugleikalógin)

Familjufyrisitingin hevur fingið til hoyringar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru.

Yvirskipað er at siga at Familjufyrisitingin tekur undir við og fegnast um uppskotið.

Familjufyrisitingin hevur einstakar viðmerkingar til uppskotið.

Til § 1, nr. 2 (§ 21)
Familjufyrisitingin hevur ikki viðmerkingar til broytingina í sjálvari ásetingini. Tó metir Familjufyrisitingin, at tað er umráðandi, at tað í serligu viðmerkingunum til ásetingina verður nágreinað, at endamálið við ásetingini er at gera greitt at samvera, ið er avtalað millum foreldur ella samvera, sum Familjufyrisitingin hevur ásett sum útgangsstøði er galdandi.

Familjufyrisitingin metir, at tað er serliga umráðandi at tað í serligu viðmerkingunum verður nágreinað, at ásetingin hevur við sær, at um bústaðarforeldrið leggur sína feriu saman við barninum uttanfyri vanliga feriutíð hjá skúlum á ein slíkan hátt, at hetta gongur út yvir regluligu samveruna hjá samveruforeldrinum, og foreldur ikki eru samd um hetta, skal bústaðarforeldrið søkja Familjufyrisitingina um, at regluliga samveran hjá samveruforleldrinum, sum fellur saman við ætlaðu feriuni fellur burtur.

Til § 1, nr. 3 (§ 23)
Familjufyrisitingin metir ikki, at tað í ásetingini skal setast sum ófrávíkilig treyt, at barnið undan ættleiðingini, hevði samveru ella annað samband við viðkomandi sum søkir um at fáa samveru ásetta.

Familjufyrisitingin metir neyðugt, at Familjufyrisitingin altíð kann taka ta avgerð um samveru, sum verður mett best fyri barnið, bæði tá samvera ella samband áður hevur verið við uppruna skyldfólk, ella um Familjufyrisitingin metir, at samvera ikki er best fyri barnið hóast barnið áður hevur havt samveru ella samband við uppruna skyldfólk.

Ásetingin kundi t.d. verið soljóðandi: *Er barnið ættleitt, kann Familjufyrisitingin eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk, serliga um barnið undan ættleiðingini hevði samveru ella annað samband við viðkomandi, ið søkir um at fáa samveru ásetta.*

Til § 1, nr. 5 (§ 29)

FAMILJUFYRISITINGIN Dr. Jakobsens gøta 21 | FO-100 Tórshavn | Tel. 20 22 24 | famf@famf.fo | famf.fo

Familjufyrisitingin hevur ikki viðmerkingar til broytingina í sjálvari ásetingini.

Familjufyrisitingin metir tó tørv á, at serligu viðmerkingarnar til ásetingina verða nágreinaðar í mun til hvussu ásetingina skal umsitast.

Sambært serligu viðmerkingunum til lógaruppskotið var ætlanin ikki at víkja frá donsku reglunum um ferðing í sambandi við samveru. Í hesum sambandi verður víst á pkt. 5.3. í donsku vegleiðingini til Forældreansvarsloven VEJ nr 10064 af 20/12/2020.

Til § 1, nr. 6 (§ 32)

Tað er ikki óhugsandi, at tørvur er á at taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barni, meðan mál um foreldramyndugleika verður viðgjørt í rættinum. Heldur enn at strika § 32, stk. 1, 2. pkt. Eigur tí at verða umhugsað, um heimildin skal broytast soleiðis, at tað verður Familjufyrisitingin, ið fær heimild at taka avgerð um hjá hvørjum barnið fyribils skal búgva, tá foreldur longu hava felags foreldramyndugleika og mál um foreldramyndugleika verður viðgjørt í rættinum. Tí er ikki óhugsandi at tørvur eisini er á at taka fyribils avgerð um bústaðin hjá barni, meðan mál um foreldramyndugleika verður viðgjørt í rættinum.

Til § 1, nr. 11 (§ 45)

Mælt verður til, at tað í serligu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður nágreinað, at tað er Familjufyrisitingin, ið metir um hvørt samverumál og bústaðarmál skal viðgerast undir einum.

Til § 2
Heimildin at veita ókeypis advokatumboðan í samverumálum og bústaðarmálum kom í gildi 1. januar 2023. Eingin avmarking er á, nær í viðgerðini ein persónur kann lata seg umboða og harvið eisini søkja um ókeypis umboðan.

Í sambandi við, at nýggja lógin kom í gildi, hevur Familjufyrisitingin tí kunnað partar í samveru- og bústaðarmálum um ókeypis advokatumboðan.

Familjufyrisitingin mælir tí til, at gildiskoman fyri § 1, nr. 11 (§ 45 í lógini) er galdandi fyri nýggj mál eftir, at lógin er komin í gildi, tvs. at tey málini, ið eru byrjaði varðveita rættin til ókeypis umboðan uttan mun til nær í málinum viðkomandi letur seg umboða.

Annað
Familjufyrisitingin mælir til, at ein yvirskrift við til dømis heitinum "Váttan" verður sett millum § 41 og § 42. Yvirskriftin yvir § 41 er ikki viðkomandi fyri § 42 og tí villeiðandi.

Vinaliga

S. Nordendal

Súsanna Nordendal
fulltrúi